# Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 6

ISSN 0907-905X


Nr.15

17. februar 2009

**Løgtingslóg**
**um**
**broyting í løgtingslóg um fjarskifti**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 6, stk. 3 verður orðað soleiðis:
„*Stk. 3.* Fjarskiftiseftirlitið tekur støðu til umsóknir um loyvi og prógv eftir Kapitli 5 A, sbr. tó stk. 4.”“

2) Í § 6 verður sum stk. 4 sett:
„*Stk. 4.* Hóast ásetingina í stk. 3 kann landsstýrismaðurin við kunngerð gera av, at annar myndugleiki ella løgfrøðiligur persónur í nærri ásettan mun kann útinna uppgávur eftirlitsins eftir stk. 3. Í hesum sambandi kunnu eisini ásetast reglur um kæru til Vinnukærunevndina, og um møguleikan hjá Fjarskiftiseftirlitinum at gera avtalu um nærri treytir í sambandi við útinnan av uppgávunum. Verður avgerðarmyndugleiki latin privatum eftir pkt. 1, skulu ásetast reglur um kæru til Vinnukærunevndina.“

3) Í § 15 e verður í stk. 1 sum 3. pkt. sett:
„Landsstýrismaðurin kann í hesum sambandi áseta, at bjargingarfeløg og onnur áhugafeløg, sum virka innan tilbúgvingarøkið, eru undantikin frekvensgjaldi.“

4) § 20 verður orðað soleiðis:
„**§ 20.** Kervisveitarar og tænastuveitarar, umframt fólk í tænastu teirra, hava skyldu til at tiga um innihaldið í fjarskiftinum og um nýtslu av fjarskifti. Tað liggur eisini á teimum at seta neyðug tiltøk í verk til tess at fyribyrgja, at óviðkomandi fáa atgongd til upplýsingar um innihald ella nýtslu av fjarskifti. Heldur ikki er teimum loyvt at nýta slíkar upplýsingar til óviðkomandi endamál.
*Stk. 2.* Tagnarskyldan eftir stk. 1 er eisini galdandi fyri Fjarskiftiseftirlitið og Vinnukærunevndina, umframt fólk í tænastu teirra. Er útinnan av ávísum uppgávum løgd til annan myndugleika ella løgfrøðiligan persón, er tagnarskyldan eftir stk. 1 eisini galdandi fyri myndugleikan ella løgfrøðiliga persónin og fyri fólk í tænastu teirra.
*Stk. 3.* Tagnarskyldan eftir stk. 1 og 2 er galdandi eisini eftir, at persónurin ikki longur er í tí starvi, har hann nam sær upplýsingarnar.

*Stk. 4.* Innihaldið av radiofjarskifti, sum verður kunnugt hjá øðrum enn tí, sum tað er ætlað, má ikki brúkast, almannakunngerast ella latast óviðkomandi. Eisini skal tað fyri óviðkomandi haldast loyniligt, at slíkt samskifti hevur verið.
*Stk. 5.* Tagnarskyldan eftir stk. 4 er ikki galdandi fyri radiofjarskifti, sum er ætlað til vanliga nýtslu hjá almenninginum, herundir neyðstøðusignal, navigasjónssignal, áhugavarping (amatørradio) og útvarps- og sjónvarpssendingar.
*Stk. 6.* Hóast reglurnar um tagnarskyldu eftir stk. 1-5, er loyvt at lata upplýsingar til myndugleikar ella altjóða felagsskapir, um tað er skylda at lata upplýsingarnar eftir hesari ella aðrari lóggávu.
*Stk. 7.* Reglurnar í borgarligu revsilógini § 152, § 152 a og §§ 152d-152f galda samsvarandi.
*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um tagnarskyldu."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 17. februar 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

lm. nr. 54/2008

Nr. 16 17. februar 2009

# Kunngerð um stuðul til flutning av fiski

Við heimild í § 3 í løgtingslóg nr. 14 frá 3. mars 1999 um stuðul til flutning av fiski, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 175 frá 21. desember 2001, verður ásett:

**§ 1.** Til flutning av fiski, livur og rogn verður eftir umsókn og skjalprógvi fyri flutningi latið fiskavirki/framleiðsluvirki flutningsstuðul í kr. fyri kilo sambært fylgiskjali 1.
*Stk. 2.* Stuðul til flutning frá landingarmiðstøð verður bert útgoldin, um landingarmiðstøðin er stað, har fiskur verður landaður, men ikki virkaður, og um fiskurin er keyptur beinleiðis frá fiskifari, uttan nakað millumlið.

**§ 2.** Til flutning av fiski, livur og rogn frá útróðrarbátum úr økjum, har eingin uppboðssøla er, verður eftir umsókn og skjalprógvi fyri flutningi latið útróðrarbátum 14 oyru/kilo í flutningsstuðli til at flyta fisk, livur og rogn til nærmastu uppboðssølu.

**§ 3.** Stuðul verður ikki latin til flutning av fiski, ið er virkaður umborð.

**§ 4.** Umsókn um flutningsstuðul skal vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi 2 mánaðir eftir, at flutningurin er farin fram. Umsókn, sum ikki lýkur hesa tíðarfreist, verður ikki viðgjørd.
*Stk. 2.* Stuðulin verður veittur føroyskum felag ella einstaklingi, ið er MVG skrásett/ur.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 104 frá 12. desember 2006 um stuðul til flutning av fiski.

Fiskimálaráðið, 17. februar 2009

**Jacob Vestergaard** (sign.)
landsstýrismaður

/Rógvi Reinert (sign.)

Fylgiskjal 1

| Frá/til | Eysturoy/ | Norðoyggjar | Sandoy | Suðuroy |
|---|---|---|---|---|
| Vágar | 0,03 | 0,06 | 0,16 | 0,23 |
| Suðuroy | 0,20 | 0,23 | 0,33 | |
| Sandoy | 0,13 | 0,16 | | |
| Norðoyggjar | 0,03 | | | |

Nr. 17 17. februar 2009

**Kunngerð
um
at seta úr gildi ávísar kunngerðir**

**§ 1**

Hesar kunngerðir verða settar úr gildi:

1) Kunngerð nr. 72 frá 8. mai 2001 um fiskiveiði eftir várgýtandi norðhavssild á ytru landleiðini við skipum úr ávísum londum,
2) kunngerð nr. 89 frá 25. mai 2000 um fiskiveiðu eftir várgýtandi norðhavssild á ytru landleiðini við skipum úr ávísum londum,
3) kunngerð nr. 64 frá 1. juli 1999 um grønlendska fiskiveiðu á ytru landleiðini eftir makreli,
4) kunngerð nr. 11 frá 10. februar 1998 um fiskiveiðu hjá føroyskum skipum eftir várgýtandi norðhavssild, sum broytt við kunngerð nr. 30 frá 13. mars 1998,
5) kunngerð nr. 38 frá 8. mars 1995 um skipanarreglur um útblaking av veiðu og um mótrokning,
6) kunngerð nr. 36 frá 8. mars 1995 um norska brugduveiðu á ytru landleiðini,
7) kunngerð nr. 11 frá 26. januar 1995 um veiðu av svartkjafti á ytru landleiðini við skipum úr Baltiski londunum,
8) kunngerð nr. 47 frá 14. apríl 1994 um tíðaravmarkað veiðubann á ytru landleiðini,
9) kunngerð nr. 1 frá 4. januar 1994 um veiðu á innaru landleiðunum við fiskiførum, sum eru skrásett í Føroyum,
10) kunngerð nr. 36 frá 16. mars 1990 um veiðu hjá skipum, skrásett í Føroyum, uttan fyri landleiðina,
11) kunngerð nr. 2 frá 14. januar 1988 um fiskiveiðu eftir rækjum og/ella skeljum í fiskivarðveitingarøkinum við Svalbard,
12) kunngerð nr. 4 frá 19. januar 1987 um meskastødd í svartkjaftafiskiskapi uttanfyri landleiðina í landnyrðings Atlantshavinum (NEAFC-sáttmálaøki),
13) kunngerð nr. 43 frá 30. mai 1985 um meskastødd í lodnufiskiskapi uttanfyri landleiðina í landnyrðings Atlantshavinum (NEAFC-sáttmála-øki),
14) kunngerð nr. 65 frá 18. oktober 1978 um fiskiveiðu eftir rækjum í kanadiskum og grønlendskum sjógvi, og
15) kunngerð nr. 63 frá 18. oktober 1978 um fiskiveiðu eftir makreli í norskum og EEC sjógvi.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 17. februar 2009

**Jacob Vestergaard** (sign.)
landsstýrismaður

/Rógvi Reinert (sign.)

FØROYAPRENT